*Hendan myndin av skúlanæmingum í Kaldbak er tikin í samband við eina útferð til Kirkjubøar um 1939/40. Upplýsingarnir eru frá Petur Skeel Jacobsen, sum júst var farin úr skúlanum, men slapp við kortini. Myndin er frá fornminnissavninum. Á myndini síggja vit: Nr. 1 Arthur Bøgarð , beiggi nr. 13. Doyði ungur. Nr. 2 Willy Bærentsen av Sundi, beiggi nr. 10. Nr. 3 John Mohr Reinert, giftur við nr. 5. Nr. 4 Hildur Jacobsen, gift Isholm, býr niðri. Nr. 5 Bergtóra Nicodemussen, gift við nr. 3. Nr. 6 Greta (Lulla) Wenningstedt Jacobsen (dóttir Karl á Tórgarði). Nr. 7 Poula Jacobsen, (systir nr. 9), gift við Jákup Apol. Nr. 8 Magnhild Petersen, gift við nr. 10. Nr. 9 Petur Skeel Jacobsen , veðurmaður hjá Sosialinum. Nr. 10 Dánjal Jákup (Baggu) Bærentsen av Sundi, beiggi nr 2 og giftur við nr. 8. Nr. 11 Maria Vang, lærari, umrødd í fyrsta parti. Nr. 12 Niels Nysted, ættaður úr Hvannasundi. Nr. 13 Helga á Bøgarði, systir nr. 1.*
*Fleiri á myndini hava samband við hesa frásøgn*




á Suðurlandið. Veðrið kundi sjálvsagt eisini spæla inn. Tað varð nærum altíð lagt at í Føroyum á veg til markna. Hetta var fyri at seta fólkið av og eisini fyri at fáa siglingarordrar.

## Komu í minubelti

Tá ráddi um at halda seg uttanfyri minufeltini, men tað kom eisini fyri, at skipini kortini komu á stongdar leiðir, og einaferð funnu vit út av, at vit lógu í minufeltinum og trolaðu. Eg stóð eina ferð afturi á hekkuni, og tá kom ein mina í veirarnar. Eg haldi, at hon var 14 favnar aftanfyri okkum, tá ið hon brast, men ikki bilti.

Hetta var á Halanum út fyri Vestfjarðum, vit undraðu okkum yvir ikki at síggja aðrar trolarar. Tað var ikki fyrr enn vit komu heim, at vit fingu at vita, at vit høvdu verið í minubelti. Hetta høvdu vit eingi boð fingið um. Esmar greiddi frá hesi hending, tá ið vit komu aftur at fáa siglingarordrar. Tann vakthvandi gjørdist púra paff, tók seg um høvdið og sigur við Esmar: »Tú stendur her?« Ja, svarar Esmar, har stóð hann. Tá sigur tann vakthavandi bretin: »Tit hava togað á einum øki, sum er minulagt, og tað er eitt undur, at tygum standa her.«

Eina ferð vit vóru komnir niður móti Skotlandi komu vit í eina konvoy. Tað ljóðaði, sum at tað varð skotið eftir konvoyuna, men meira hendi tíbetur ikki. Men so lítið nervaði tað meg, at eg svav trygt fyri tað.

## Halin var lumpisligur

Eg havi verið við til at fiska nógv á Halanum, sum er fiskileið út frá Vestfjarðum í Íslandi. Her kundi vera sera lumpisligt veður. Eg minnist einaferð, at vit høvdu gott veður, og tað var mestsum stilli. Tá fer sjógvurin knappliga at øtla. Vit arbeiddu á dekkinum, og vit fingu boð um at skalka lúkurnar beinanvegin. Sjógvurin gjørdist beinanvegin so ringur, hóast tað var stilli. Knappliga kom ein sjógvur aftani frá, og breyt frá hekkuni og fram um brúnna, men vit vóru fyrireikaðir og einki hendi.

Á halanum var so sera nógvur fiskur. Tað kundi vera nógvur toskur, men vit fingu eisini full trol av kongafiski, sum eisini hevði góðan prís í Aberdeen. Tað kundi eisini vera nógvur upsi í trolinum.

## Royndist illa undir Føroyum

Eg kann skoyta uppí, at roynt varð viðhvørt at kasta undir Føroyum, men lítið kom burtur úr. Eina ferð royndu vit við Norðbúgvanum við Hans Paula sum skipara at fáa túr undir Føroyum, men tað gekk illa at fáa uppí hann. Vit royndu í 14 dagar, men hann bleiv ikki ordiliga fullur. Hetta var heldur ikki dámt av útróðrarmonnum, sum roknaðu trol fyri at vera ein oyðandi reiðskap. Tað var nakað heilt annað at royna undir Íslandi. Tað var tað sama galdandi tá sum nú, at tað er nógv meira fyri av fiski undir Íslandi enn undir Føroyum. Tað líknar ikki saman.



*Abbabørnunum hjá Gustav dámdu væl at koma inn á Sund at ferðast. Her síggjast f.v. Andrias, Helena, Gustav og Margretha hjá Solveig og Andrea hjá Gimma. Bóndagarðurin sæst aftanfyri*

## Kolldømdur fiskur kortini góðan prís

Eina ferð vit komu inn í Scrapster, lá Bjørn Ólason har við fullari last við maskinskaða. Vit skuldu skjótt avstað, men teir bóðu so Hans Paula um sleip. Hann var grúiliga trekur. Eitt sleip tók jú eisini tíð, og júst í hesi vinnu merkti tíð pengar, ofta nógvar pengar. Men Hans Pauli eftirlíkaði kortini, vit tóku hann so uppá sleip til Aberdeen. Teir landaðu, fiskurin var gamal, og tað varð alt kolldømt, meðan vit fingu góðan túr. Jens av Reyni hevur verið niðri tá. Hann kom oman á fiskamarknaðin og sá skilið. Hann hvarv ein løtu aftaná. Hvussu var og ikki, men hann hevði so fingið orðnað fyri, at fiskurin í hvussu er skuldi seljast. So varð gjørt, og teir fingu ein góðan túr kortini. Teir seldu fyri eini 6.000 pund. Tað vóru nógvir pengar tá, pundið var omanfyri 20 krónur.

Í 2005 hevði FF-blaðið eina røð av samrøðum við Sofus Poulsen, sum hevur verið okkara umboðsmaður í Aberdeen í meira enn hálva øld. Hann greiddi frá, at tað var sjáldan, at fiskur varð kolldømdur í Aberdeen. Um heldur vánaligan fisk segði Sofus, at hann kundi væl skerast til flak, men hann varð tó ikki skrællaður. Hann varð lagdur í saltlaka, viðhvørt við eitt sindur av gulari liting í. So varð fiskurin roykturin, og hetta riggaði heilt væl.

Tað var annars altíð hampiliga friðarligt, tá ið vit lógu inni í Bretlandi. Tað var bert eina ferð vit vóru í landi, at tað var luftalarmur. Tá vóru vit koyrdir í onkran kjallara. Onkur flúgvari varð tó niðurskotin. Vit sóðu seinni um dagin rovini av einum flogfari í einum lastbili.

Tá ið eg hevði siglt 33 túrar, fór eg av Norðbúgvanum. Verður roknað við 15 dagar uppá túrin verður hetta um 500 dagar.

## Komandi partur

Í komandi parti greiðir Jakku frá tí ringasta illveðrinum, hann hevur upplivað. Hann fer við Fiskanes, og so byrjar lívið sum útróðrarmaður. Vit hava eisini meira av tilfari frá bóndagarðinum. Greitt fer at verða frá Müllerættini á Sundi.